# Ársfrágreiðing 2016 – Krabbameinsfelagið

- **GRANSKING**
- **FYRIBYRGING**
- **RÁÐGEVING, STUÐUL OG RØKT**

## Krabbameinsfelagið

Grønlandsvegur 58
Postboks 1216
110 Tórshavn
Telefon: 31 79 59
Heimasíða: www.krabbamein.fo
T-postur: kmf@krabbamein.fo

Starvsfólk
Dagligur leiðari:
Jansy Gaardlykke
Ráðgevandi sjúkrarøktarfrøðingur:
Sólrun Jacobsen
Skrivstova:
Poula Norðbúð

## Nevndin í Krabbameinsfelagnum

| | |
|---|---|
| Formaður: | Durita Tausen |
| Næstformaður<br>& kassameistari: | Sonja Nielsen |
| Nevndarlimur: | Magnus Magnussen |
| Nevndarlimur: | Katrin Kallsberg |
| Nevndarlimur: | Johan Poulsen |
| Tiltakslimur: | Martin Joensen |
| Tiltakslimur: | Elmar Ósa |

## Hjálpargrunnurin

Durita Tausen
Katrin Kallsberg
Jónvør Christiansen

## Team Rynkeby Føroyar

Elmar Ósá
Katrin Kallsberg
Durita Tausen

# Innihald

| | |
|---|---|
| Fororð | 3 |
| Átøk, samstørv og annað virksemi | 4 |
| Ráðgevingarstova og hjálparbólkar | 9 |
| Virksemi í ymsu bólkunum | 9 |
| Tilboð til sjúklingar og avvarðandi | 11 |
| Krabbameinshagtøl | 13 |

# Fororð



At tað ber til hjá Krabbameinsfelagnum at veita góða og munadygga hjálp, kemst serliga av góðum fíggjarligum stuðlum og øllum tí munadygga arbeiði, sum sjálvboðin gera. Hetta ger, at vit betur kunnu røkka málinum hjá Krabbameinsfelagnum: at stuðla gransking, gera fyribyrgjandi arbeiði og ikki minst at hjálpa teimum, sum hava ella hava havt krabbamein og eisini teimum, sum varða av.

Eisini 2016 hevur hilnast væl, og nógv er at vera takksom fyri. Aftur kunnu vit ásanna, at Krabbameinsfelagið hevur stóra vælvild millum føroyingar. Millum fyritøkur, myndugleikar, fjølmiðlar, privatfólk, sjúklingar og tey, sum varða av.

Úr vælvildarrúgvuni kunnu vit nevna stóru stuðulskonsertina á Strondum, sum Lív Jónsveinsdóttir Ludvig skipaði fyri, við hollum stuðli frá bygdafólkinum og ikki minst tónleikarum.

Eisini at Frælsi, ítróttarfelagið í Vágum, bjóðaði Krabbameinsfelagnum at vera við í Føroya vakrasta hálvmaraton. Og tað var sanniliga vakurt í Vágum henda góðveðursdagin.

Og so Team Rynkeby, sum í 2015/2016 savnaði meiri pening, enn nakrantíð fyrr. Peningur, sum verður brúktur til at hjálpa og lætta um hjá teimum børnum, sum hava ella hava havt krabbamein og familjum teirra, og hjá teimum, sum hava mist eitt barn. Og sum eisini verður brúktur at granska fyri, so at krabbameinsgátan kann verða loyst.

Bara fyri at nevna nøkur.

Í 2016 hava nakrir av dyggu stuðlunum hjá felagnum tikið seg úr álitissessum.

Jákup N. Olsen og Agnar á Dul fóru úr nevndini í Krabbameinsfelagnum. Agnar hevði sitið í nevndini, síðani felagið varð stovnað í 1979, øll árini sum kassameistari. Jákup kom í nevndina í 1987, og sat sum formaður í 24 ár.

Karen Heinesen, sum í 16 ár hevur hjálpt Krabbameinsfelagnum at veita ráð og vegleiðing í sosialum spurningum, fór í 2016 frá fyri aldur.

Eisini Heidi Hvidbro steðgaði í 2016 sum forkvinna í Bót til bata, eftir í nógv ár at hava staðið á odda og lagt stóra orku í at hjálpa og stuðla kvinnum við bróstkrabba og skipa fyri tiltøkum í tí sambandi. Heidi heldur fram sum næstforkvinna.

Teimum fýra, og øllum hinum sjálvbodnu og øðrum, sum við síni fakligu vitan, fíggjarligu hjálp og vælvild hava stuðla Krabbameinsfelagnum, takka vit hjartaliga.

Takk fyri gott samstarv í 2016.

*Durita Tausen, forkvinna*

# Átøk, samstørv og annað virksemi í 2016

## Formanskifti í Krabbmeinsfelagnum

Á aðalfundinum hjá Krabbameinsfelagnum í 2016, var formansstaffettin handað víðari.

Jákup N. Olsen, sum hevur sitið í nevndini í Krabbameinsfelagnum í umleið 30 ár, og 24 ár sum formaður, segði, at hann nú lat einum nýggjum formanni uppgávuna at stíla fyri arbeiðinum í Krabbameinsfelagnum.

Hann segði eisini, at hann hevði verið glaður fyri tíðina sum formaður. ”Saman við nógvum eldsálum kann eg fegnast um, at nógv er komið burturúr hesi árini. Eitt av stórstu frambrotunum er, at vit fingu eina krabbameinsætlan í 2009. Henda ætlanin hevur verið við til at krabbameinssjúklingar í Føroyum fáa bestu viðgerð og røkt, sum ikki stendur aftanfyri tey vælferðarlond, sum vit vanliga samanbera okkum við”, segði Jákup N. Olsen.

Nevndin skipaði seg eftir aðalfundin við Duritu Tausen sum forkvinnu og Sonju Nielsen sum næstforkvinnu.

## Krabbameinsfelagið skipaði fyri gongu ½ maratoni

Leygardagin 4. juni 2016 gingu 197 fólk hálvmaraton hjá Krabbameinsfelagnum, sum var partur av Tórshavn Maraton. 203 fólk høvdu meldað til, og tað var fullteknað langt áðrenn tíðarfreistina.

Gongu½maraton er skipað í samstarvið við Bragdið, sum skipar fyri Tórshavn Maraton. Gongu½maraton fór av bakkastokki í 2015, sum ein liður í arbeiðinum hjá Krabbameinsfelagnum at varpa ljós á krabbamein og tað stríð, fólk við hesi sjúku skulu ígjøgnum. Ein partur av luttøkugjaldinum fer beinleiðis til Krabbameinsfelagið.

## Norðurlendsku krabbameinsfeløgini sameinast um at fyribyrja tubbaksnýtslu ímillum børn og ung

NCU, sum er felagsskapur hjá Norðurlendsku krabbameinsfeløgunum, hevði fund 30. mai 2016 í Reykjavík.

Alheimsroykleysur dagur er 31. mai, og í tí sambandi skrivaðu Norðurlendsku krabbameinsfeløgini ta áheitan, at tubbaksvørur skulu vera í pakka, sum er einfaldur. Tað merkir, at tað skal vera bannað at nýta búmerki, litir, merkjamyndir ella átaksupplýsingar. Á pakkanum skal einans vera merkjanavn og vørunavn víst í heilt einføldum liti og skriftsniði.

Hvørt ár doyggja 37.800 fólk í Norðurlondum av sjúkum, ið elvdar eru av tubbaki, og um allan heim doyggja seks milliónir. Roknað verður við, at í Føroyum doyggja umleið 120. Nógv teirra doyggja av krabbameini. Norðurlendsku krabbameinsfeløgini sameindust tí á Alheimsroykleysa degnum við tí felagsmáli at fyribyrgja tubbaksnýtslu ímillum børn og ung.

## Grannakaffi

Tiltakið Grannakaffi hjá Krabbameinsfelagnum sá dagsins ljós í mars í 2015 og heppnaðist so mikið væl, at avgjørt varð at endurtaka tað somu tíð 2016.

Hugskotið til Grannakaffi eigur Urd Johannesen, sum í 2009 samskipaði stóru innsavningina ”Føroyar móti krabba”. Høvuðsendamálið er at savna pening til støðuga arbeiðið hjá Krabbameinsfelagnum við upplýsing, fyribyrging og gransking, men hevur sín uppruna í spurninginum ”Hvat kann eg gera fyri at hjálpa?”, sum avvarandi og onnur ofta seta felagnum.

Í 2015 var meginparturin av vertunum einstaklingar og smærri eindir, meðan eindirnar hava verið størri í 2016, tí fleiri heilar bygdir, grannaløg og feløg skipaðu fyri felags Grannakaffi. Men framvegis vóru yvir 80 Grannakaffi tiltøk runt allar Føroyar. Grannakaffi 2016 gav útvið hálva millión kr. í stuðli.

## Stuðulin frá Spyr.fo munar væl hjá Krabbameinsfelagnum

Spyr.fo og Krabbameinsfelagið endurnýggjaðu stuðulsavtaluna, sum varð gjørd í 2015. Stuðulin fer til gransking og upplýsing um prostata- og bróstkrabba, sum eru størstu sjúklingabólkar hjá monnum og kvinnum.

Spyr.fo er skjótur, ómakaleysur og ókeypis stuðulsmøguleiki, har fólk stuðla við at svara skjótum spurnarkanningum á fartelefonini. Afturfyri letur tann, ið ger kanningina, 4 kr. pr. svaraða spurnaðarkanning til Krabbameinsfelagið.

4.000 føroyingar eldri enn 15 ár eru skrásettir hjá Spyr.fo.

## Føroya vakrasta hálv maraton saman við Ítrottarfelagnum Frælsi og Krabbameinsfelagnum

Ítróttarfelagið Frælsi í Vágum skipar árliga fyri eini hálv maraton renning í september. Runnið verður úr Gásadali og til kirkjuna í Sandavági.

Umframt vanliga hálv maraton renning, var í 2016 samstundis skipa fyri gongu½maraton, hetta bleiv gjørt í samstarv við Krabbameinsfelagið. 160 luttakarar vóru til Føroya vakrasta gongu½maraton.

## 'Tryggleiki í sólfrítíðini' - njóta sólina við skili

NCU er samgonga fyri norðurlendsku krabbameinsfeløgini úr Noregi, Svøríki, Finnlandi, Íslandi, Danmark og Føroyum. (www.ncu.nu). Við felags verkætlanini 'Tryggleiki í sólfrítíðini' hevur síðan 2012 verið virkað fyri at fáa boðskapin út um trygga atferð í sólini.

Atlantic Airways gevur í alt størri mun føroyingum møguleika at njóta summar og sól sunnanfyri. Hetta munnu mong fegnast um.

Í hesum sambandi gjørdi Krabbameinsfelagið, saman við Atlantic Airways, eina heilsíðulýsing, til 'Atlantic Review', ið vísir á týdningin av at njóta sólina við skili. Gransking og hagtøl vísa, at tilburðirnir av krabbameini í húðini er nógv vaksin síðan sjeytiárini, tá norðurlendingar fóru at ferðast suðureftir og at leggja seg í solarium.

## Stórur konsertdagur á Strondum

Krabbameinsfelagið fekk allan ágóðan av stóra sjálvbodna konsertdegnum, sum varð í bygdarhúsinum á Strondum leygardagin 17. september við ikki færri enn 13 tónleikanøvnum á plakatini.

Tað var Lív Jónsveinsdóttir Hansen á Strondum, ið sjálv hevur sungið og spælt nógv, sum tók stig til stóra konsertdagin. Dagurin byrjaði kl. 15.30 og helt fram líka til á midnátt, við 13 framførslum, trimum frásagnum og gykli.

Allar inntøkurnar frá konsertini fóru óskerdar til Krabbameinsfelagið og tað var ikki smávegis, sum kom burturúr. Krabbameinsfelagið fekk handað kr. 76.700 frá fyriskiparanum.

## Team Rynkeby Føroyar

Peningurin, sum Team Rynkeby Føroyar savnaði inn í sambandi við túrin til París í 2016, varð handaður forkvinnuni í Krabbameinsfelagnum, Duritu Tausen, á samkomu á Reinsarínum.

Upphæddin, sum føroyska súkkluliðið fekk inn í 2015/16, varð 1.120.000 krónur.

48 súkklarar og tíggju hjálparfólk gjøgnumførdu í ár túrin úr Klaksvík til París. Samlað varð súkklað 1428 kilometrar.

"Endamálið er at gera nakað gott fyri onnur og tí fløvar tað almikið, at vit kunnu handa eina so stóra peningaupphædd til børn við krabbameini. Vit hava funnið ein hóskandi leist fyri, ið ger okkum før fyri at stuðla børnunum á hvørjum ári, samstundis sum vit órógva onnur, ið eisini hava tørv á stuðli, minst møguligt," sigur Finn Danberg, landsstjórin fyri Team Rynkeby í Føroyum.

## Evnisdagur - Missur og sálarligur stoytur í familjuni

Í mai mánaði skipaði Krabbameinfelagið fyri evnisdegi undir heitinum "Missur og sálarligur stoytur í familjuni". Á evnisdegnum greiddi Inge Kaldahl, sálrfrøðingur, frá ástøði og dømum úr egnum yrki. Dagurin varð hildin í veistluhøllini á Landssjúkrahúsinum og nógvir luttakarar vóru.

## Lesandi í starvsvenjing hjá Krabbameinsfelagnum

Tvær lesandi vóru í obervatiónspraktik hjá Krabbeminsfelagnum í 2016. Tað vóru Sólja J. Christiansen, ið lesur sjúkrarøktarfrøði á Diakonissestiftelsen í Keypmannahavn og Guðrið Muller, sum lesur sjúkrarøktarfrøði á Fróskaparsetrinum.

## Evropeiskt og Norðurlendskt samstarv

Í oktober var Krabbameinsfelagið á fundi í ECL (European Cancer Leagues). 18 limalond luttóku á fundinum, sum varð hildin í París.

ECL varð sett á stovn í 1980 og føroyska Krabbameinsfelagið hevur havt fullan limaskap síðan 2000.

Tilsamans eru 21 lond limir í felagskapinum. Feløgini í ECL brúka tilsamans 850 milliónir evrur í bardaganum móti krabbameini. Tilsamans hava feløgini 2.550 fólk í løntum starvi, umframt 200.000 sjálvboðin.

Aðalendamálið hjá felagsskapinum er at fylgja við og ávirka heilsupolitikkin í Europa.

Krabbameinsfelagið er eisini limur í NCU (Nordic Cancer Union). NCU er eitt samstarv millum tey norðurlendsku krabbameinsfeløgini. Endamálið hjá NCU er at tryggja bestu viðgerð móti krabbameini og íverksetan av munagóðum fyribyrgingarátøkum í Norðurlondum. Í 2016 vóru 4 fundir í NCU, í Noregi í februar, í Íslandi í mai, í Finnlandi í september og í Keypmannahavn í november.

## Ráðgevingarstova og hjálparbólkar

Á ráðgevingarstovuni hjá Krabbameinsfelagnum hevur sum undanfarin ár verið nógv samskifti og samband við fólk við krabbameini, avvarðandi og onnur.

Tveir ráðgevandi sjúkrarøktarfrøðingar starvast hjá Krabbameinsfelagnum. Tær vegleiða, hava telefonviðtalu og beinleiðis samtalur við sjúklingar, familjur og avvarðandi. Sjúklingum stendur eisini í boði at gerast partur av samtalubólkum og sjálvhjálparbólkum.

Krabbameinsfelagið hevur í mong ár havt sosialráðgeva knýttan at felagnum. Karen Heinesen hevur verið sosialráðgevi hjá felagnum, men í december legði Karen frá sær vegna aldur. Leif Olsen tekur yvir sum sosialráðgevi hjá Krabbameinsfelagnum. Leif hevur drúgvar royndir innan øki.

Krabbameinsfelagið er talurørið hjá krabbameinssjúklingum og teirra avvarandi. Tað er tí fremsta uppgávan hjá starvsfólkunum at varnast tørv og áhugamál hjá krabbameinsraktum, at menna tænastur og at skipa samskiftisátøk hareftir.

## Nógv virksemi í ymsu bólkunum

Skipað hevur verið fyri bæði fyrilestrum, hugnaløtum og øðrum átøkum.

**Prostatabólkurin:** Prostatabólkurin hevur havt nakrar fundir, og undirtøkan hevur verið góð. Í januar skipaði bólkurin fyri hugnaløtu, har Johan Poulsen yvilækni og urologur segði frá tí nýggjasta innan viðgerð fyri prostatakrabba.

4. apríl 2016 skipaði prostatabólkurin fyri stórum kunnandi tiltakið á Hotel Føroyum undir heitinum "Kvinnur onga atgongd". Kendi danski professarin og yvirlækni í urologi, Michael Borre, hevði ein fyrilestur um prostatakrabba og um orsøkir til sjúkuna, so sum ættarbregði og lívsstíl. Hann greiddi frá um endurmenning og tað nýggjasta innan viðgerð av prostatakrabba. Eisini hevði Johan Poulsen, yvirlækni og urologur, ein stuttan fyrilestur um samskipan av urologiska økinum í Føroyum.

**Bót til Bata:** Fleiri av kvinnunum í Bót til Bata vóru vertir, hjálptu til ella søgdu sína søgu í samband við Grannakaffi 2016.

Í september vóru 2 umboð fyri bólkin í Íslandi á ráðstevnum um arvaligan bróstkrabba.

Í oktober seldi bólkurin armbond tilevnað úr silvuri, sum Turið Mohr hevði sniðgivið, og ringar, sum Elin Lindenskov hevði gjørt úr endurnýtslutilfari.

Í november skipaði bólkurin fyri hugnaløtu, har nógvar kvinnur møttu.

**Undirlívsbólkurin:** Í februar skipaði bólkurin fyri hugnaløtu, har systrarnar Dagmar og Beinta Clothier søgdu frá, hvussu tað var ávíkavist at vera sjúk og avvarðandi.

Í apríl luttóku umboð fyri bólkin á ráðstevnu um seinárin, hjá systurfelagnum KIU í Danmark.

Í november skipaði bólkurin aftur fyri hugnaløtu, hesa ferð segði Margret Mortensen frá um sorg í samband við at fáa staðfest krabbamein, familjuna, tey ungu og børnini í støðuni og tómrúmið, sum er eftir viðgerðina. Margret Mortensen er sjúkrarøktarfrøðingur við sergrein í krabbameinsviðgerð og psykoterapeutur.

**Móðurmerkjabólkurin:** Móðurmerkjabólkurin hevur verið saman eina ferð í 2016. Bólkurin hevur ikki fingið nýggjar limir seinnu árini – sum vónandi merkir, at tað ikki eru so nógvir nýggir kritiskir tilburðir av móðurmerkjakrabba.

Norðurlendska samstarvið, Sikkerhed på solferie, hevur havt ein fund í ár, har Føroyar eisini vóru umboðaðar. Arbeitt verður áhaldandi við at fáa stórar fyritøkur við umboðan í flestum Norðurlondum at fremja tryggar vanar á ferðum sunnanfyri. Hetta við upplýsing áðrenn ferðina, møguleika at vera í skugga heitastu tíðina á degnum, og við rættari atferð á ferðini. Hetta er tó eitt arbeiði, ið tekur drúgva tíð at fáa ferðasamskiparar at skilja, at tað bara eru vinnarar í at kunnað verða um trygga atferð. Tað verður jú ikki frámælt at fara suðureftir – hinvegin verður bert givin nøkur góð ráð at fyribyrgja, at fólk verða skáldað.

Seinnu árini er Atlantic Airways farið at gera alt fleiri ferðir suðureftir. Saman við leiðsluni í Krabbameinsfelagnum hevur nú eisini eydnast okkum at fáa Atlantic Airways at kunna um rætta atferð í sólini í blaðnum, Atlantic Review. Tað sama fór Smyril Line í holt við fyri nøkrum árum síðani. Tey gera tað á heimasíðuni. Bæði Atlantic Airways og Smyril Line hava verið sera samstarvssinnað í hesum høpi, og tað gevur okkum vón um, at tað eisini fer at eydnast við øðrum føroyskum ferðasamskiparum.

Nú er hálvtannað ár síðan 18 ára aldursmark er samtyktí sambandi við solarium. Enn vita vit ikki, í hvønn mun hetta hevur ávirkað teir ungu tannáringarnar. Men vit síggja, at onkur svimjihøll hevur avtikið solariumtilboðið. Tær hava staðfest, at tær ikki fáa økonomi í tað, um tey undir 18 ikki sleppa at keypa solarium.

**Foreldrabólkurin:** Foreldur at børnum við krabbameini hava skipað fyri fleiri hugnaløtum í 2016. Vanligt er, at tey møtast heima hjá onkrum í bólkinum. Fleiri í bólkinum vóru á árligu gallaveitsluni hjá Team Rynkeby Føroyar, sum varð hildin á Hotel Føroyum í ferbuar.

Foreldrabólkurin hjá Krabbameinsfelagnum skipaði fyri familjudøgum á Háskúlanum í Havn. Á skránni var millum annað spøl, hugni og samvera, fyrilestur og refleksión við Inge Kaldahl, sálarfrøðingi, og tekniverkstaður við Janusi á Húsagarði.

Tiltakið var fyri familjur at børnum, sum hava ella hava havt krabbamein og familjur, sum hava mist børn av krabbameini.

Eins og undanfarin ár skipaði bólkurin fyri jólaborðhaldi.

**Stomibólkurin:** Stomiambulatoriið á Landssjúkrahúsinum hevur skipað fyri einum kvøldi at undirvísa fólki, ið hava stomi, og teirra avvarðandi.

# Tilboð til sjúklingar og avvarðandi

### Samtalubólkur fyri tey, sum hava mist makan

Endamálið við at savna fólk, ið hava mist makan, er at geva tí einstaka møguleikan at seta orð á og viðgera tær kenslur, tankar og trupulleikar, sum eru, tá ið tú missir makan. Samtalurnar við onnur í somu støðu kunnu stuðla og styrkja víðari í lívinum.

### Samtalubólkur fyri makar hjá krabbameinssjúklingum

Tá krabbamein rakar, broytist gerandisdagurin, og tey avvarðandi skulu taka støðu til nógv nýggj viðurskifti, bæði praktisk og kensluliga. Mitt í sorgini og stúranini skal makin hjá tí sjúka bæði hjálpa, ugga og fáa gerandisdagin at virka sum best fyri allar partar. At hitta fólk í somu støðu í einum umhvørvi, har tað er í lagi at seta orð á sínar hugsanir og fáa stuðul at loysa ymsar trupulleikar í trúnaði, er við til at geva orku og styrkja tann avvarðandi til at megna sínar uppgávur.

### Samtalubólkur fyri fólk, sum eru sjúk av krabbameini

At vera sjúk/-ur og fáa viðgerð fyri krabbamein kann vera sera tyngjandi og ávirka alla tilveruna, viðgerðin hevur ofta hjáárin við sær, sálarliga kann tað eisini vera torført. At hitta onnur í líknandi støðu kann gera stóran mun. Okkara royndir vísa, at tað hjálpir at práta við onnur og seta orð á og deila ymiskar upplivingar. Hetta minkar um óttan, og tú fært léttari greiðu á tí, sum bylgist innaní av kenslum og tonkum. Lívsmótið og lívsgóðskan gerast størri, og dagligu avbjóðingarnar verða léttari.

## Skeið í hár-, húð- og andlitsrøkt fyri kvinnur við krabbameini

Body Shop í SMS skipar regluliga fyri skeiðum í hár-, húð- og andlitsrøkt. Umframt starvsfólk er eisini hárskeri við royndum í at gera hárkollar til staðar. Skeiðið er fyri kvinnur við krabbameini. Skeiðið er ókeypis og Krabbameinsfelagið tekur sær av at lýsa við og kunna um skeiðini. Í 2016 hevur The Body Shop skipað fyri trimum skeiðum.

## Familjusamtalur

Familjusjónarhornið hevur stóran týdning í ráðgevandi arbeiðinum hjá felagnum. Tá ið ein í familjuni gerst sjúkur ella doyr, rakar tað alla familjuna, eisini børnini.

Endamálið við familjusamtalum er, at øll í familjuni í felag fáa sett orð á tað, sum er svárt og torført og á tann hátt fáa hjálp til í felag at stuðla og hjálpa hvør øðrum.

## Listterapi

Í 2016 var skipað fyri listterapi-skeiðum fyri fólki, sum hava, ella hava havt krabbamein. Listterapi er 2 ferðir árliga, á vári og á heysti.

# Krabbameinshagtøl í 2016

Tilsamans vóru 236 nýggir tilburðir av krabbameini staðfestir í Føroyum í 2016.

Bróstkrabbi er vanligasta slagið av krabbameini hjá kvinnum. Hesi seinastu sjey árini eru millum 20 og 30 tilburðir staðfestir árliga.

Prostatakrabbi er vanligasta slagið av krabbameini hjá monnum. Seinastu sjey árini eru millum 21 og 36 tilburðir staðfestir árliga.

Í krabbameinsdátugrunninum Nordcan ber til at finna føroysku tølini á alnetinum og samanbera tey við onnur lond.

Tølini fyri 2016 eru fyribilstøl og skulu verða tikin við fyrivarni.

*Orðalisti yvir sløg av krabbameini er á síðu 16*

## Yvirlit yvir krabbameinstilburðir 1995 – 2016

**Yvirlit yvir cancertilburðir íalt 1995 - 2016**

| Antal | Diagn. Ár | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 1995 | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
| Cancer Diagnosur | 180 | 201 | 178 | 168 | 183 | 152 | 165 | 171 | 167 | 188 | 210 | 186 | 198 | 188 | 230 | 224 | 195 | 211 | 216 | 189 | 235 | 236 |



## Krabbamein í prostata

| Cancer C61 | Prostatae | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Antal | Diagn. År | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| | 1995 | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
| C61 | 7 | 11 | 4 | 7 | 4 | 4 | 4 | 6 | 16 | 13 | 19 | 25 | 30 | 27 | 44 | 32 | 24 | 36 | 21 | 22 | 31 | 22 |




## Húð- og móðurmerkjakrabbamein

| Cancer C43, C44 | (C43 melanom - C44 basocellulært carcinom) | | | | | | | 1995 - 2016 | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Antal | Diagn. År | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| | 1995 | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
| C43 | | 1 | | 1 | 6 | 2 | 1 | 7 | 4 | 8 | 7 | 10 | 6 | 8 | 2 | 6 | 5 | 5 | 3 | 1 | 3 | 9 |
| C44 | 15 | 11 | 10 | 8 | 9 | 9 | 17 | 24 | 24 | 13 | 49 | 32 | 22 | 26 | 23 | 35 | 23 | 30 | 38 | 34 | 40 | 37 |



## Krabbamein í bróstinum

| Cancer mammae C50 | | | Bróstkrabbi | | | | | 1995 - 2016 | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Antal | Diagn. Ár | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| | 1995 | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
| C50 | 21 | 17 | 10 | 15 | 8 | 21 | 23 | 23 | 23 | 29 | 17 | 17 | 21 | 21 | 22 | 25 | 20 | 21 | 24 | 21 | 25 | 30 |




## Krabbamein í lunga

| Cancer pulm C34 | Krabbamein í lungum | | | | | 1995 - 2016 | | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Antal | Diagn. Ár | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| | 1995 | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
| C34 | 9 | 14 | 17 | 13 | 10 | 9 | 11 | 10 | 10 | 14 | 13 | 6 | 15 | 17 | 14 | 17 | 12 | 15 | 15 | 15 | 19 | 19 |



## Maga/tarm krabbamein

| Cancertilburðir C15, C16, C18, C20 | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Antal | Diagn. År | | | | | | | | |
| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
| C15 - kræft spiserør | 2 | 1 | 6 | 3 | 8 | 8 | 4 | 5 | 4 |
| C16 - kræft mavesæk | 3 | 5 | 3 | 6 | 5 | 2 | 9 | 10 | 4 |
| C18 - kræft tyktarm | 16 | 12 | 19 | 23 | 13 | 14 | 13 | 25 | 17 |
| C20 - kræft endetarm | 11 | 11 | 11 | 8 | 8 | 14 | 12 | 12 | 10 |




## Krabbamein í undirlívinum

| Cancer C51, C53, C54, C56 | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Antal | Diagn. År | | | | | | | | |
| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
| C53 | 13 | 8 | 5 | 10 | 4 | 2 | 0 | 6 | 18 |
| C54 | 2 | 14 | 4 | 2 | 4 | 3 | 4 | 5 | 6 |
| C51 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 2 | 2 |
| C56 | 1 | 4 | 6 | 5 | 0 | 3 | 5 | 1 | 3 |



## Krabbamein í brisi

| Pancreas C25 | 1995 - 2016 | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Antal | Diagn. År | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| | 1995 | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
| C25 | 1 | 6 | 4 | 6 | 6 | 7 | 6 | 4 | 4 | 7 | 4 | 6 | 6 | 8 | 8 | 9 | 5 | 10 | 8 | 4 | 5 | 6 |




C-15:Cancer oesophagus

C-16:Cancer ventriculi

C-17:Tyndtarm

C-18:Tyktarm

C-19:Rectosigmiodeo

C-20:Recti

C-25:Pancreas

C-43:Móðurmerkjakrabbi

C-44:Vanligur húðkrabbi

C-34:Lungnakrabbi

C-50:Cancer mammae

C-51:Cancer vulvae

C-53:Cervix uteri

C-54:Corpus uteri

C-55:Livmoder minus specif.

C-56:Ovarii

C-61:Cancer prostatae

Kelda: Landssjúkrahúsið

Krabbameinsskráseting Føroya, Medisinski depilin.

*NORDCAN [http://www-dep.iarc.fr/NORDCAN/DK/frame.asp](http://www-dep.iarc.fr/NORDCAN/DK/frame.asp)*

**Heldin** er búmerkið hjá Krabbameinsfelagnum og ímyndar virðisgrundarlagið hjá felagnum. Heldin er gamalt føroyskt hjálparamboð, ið varð nýtt til hoybyrðar.

**Heldin** bæði knýtir saman og loysir byrðuna aftur.

Soleiðis roynir Krabbameinsfelagið at hjálpa tær, ið hevur ella hevur havt krabbamein, so tunga byrðan gerst lættari hjá tær og tínum at bera.